**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
**Beinir Johannesen**
**Eyðdis Hartmann Niclasen**
**Bárður á Steig Nielsen**
**Steffan Klein Poulsen**
**Jenis av Rana**
**løgtingsfólk**

Løgtingið

**Uppskot til**

# Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at skatta inntøkur av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattalógin)

(Lægri skattaprosent fyri vanliga kolvetnisinntøku)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 26 frá 21. apríl 1999 um at skatta inntøkur av kolvetnisvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 26 frá 7. mars 2000 og løgtingslóg nr. 23 frá 17. mai 2004, verður § 11, stk. 3 orðað soleiðis:

"*Stk. 3.* Persónar og feløg, sjálvsognarstovnar, felagsskapir, deyðsbúgv o.o., ið hava inntøku, sum er nevnd í § 4, stk. 1 og 2, gjalda umframt serskatt eftir kapittul 2 a inntøkuskatt til landskassan av tílíkari inntøku eftir einum ásettum prosentstigi, ið svarar til galdandi skattastig fyri partafeløg. Inntøkuskatturin verður at rokna serstakt av inntøku, ið kemur undir § 4, stk. 1 og 2."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2026.

**Almennar viðmerkingar**

Til spurning frá Fíggjarnevndini í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri fíggjarárið 2026 um, hvussu áhugin er fyri kolvetnisleiting á føroyska landgrunninum, svaraði Jarðfeingi, at eingin ivi er um, at tað enn er áhugi fyri føroyska økinum.

Oljufeløg vilja fegin hitta Jarðfeingi, og tað er regluligt samband við fleiri teirra, serliga tey, sum eru virkin vestan fyri Hetland, og tey fylgja væl við, hvat hendir í føroyskum øki.

Víst varð á, at prógv eru fyri, at kolvetni (olja og gass) finst í føroysku undirgrundini og er seyrað upp gjøgnum jarðarløgini. Hetta sæst í data frá fylgisveinum, havbotns- og landroyndum, umframt frá fleiri av teimum leitibrunnunum, sum vórðu boraðir eystanfyri Føroyar árini 2001-2014.

Harumframt er olja funnin í boringini “Marjun”og gass er funnið í boringini “Anne Marie”, t.e. at kolvetni í hesum førum er fangað í undirgrundini. Bert í trimum av teimum níggju føroysku offshore boringunum vóru ongi spor eftir kolvetni funnin.

Tað eru bert boraðir níggju leitibrunnar í føroyskum øki, meðan tað vórðu boraðir 20-30 í Hetlandsrennuni og yvir 30 í norskum øki, áðrenn fyrstu, rakstrarverdu oljufeltini vórðu funnin har.

Víst varð eisini á, at møguleikin fyri at fáa oljufeløg inn í føroyskt øki at leita, er nær tongdur at framtíðar framleiðsluni av kolvetni í Hetlandsrennuni. Um skattaviðurskiftini í bretskum øki verða normaliserað (t.e. at eykaskatturin á kolvetnisframleiðslu – nevndur windfall tax – verður avtikin) og um politisku myndugleikarnir har lata upp fyri leiting eftir meira kolvetni í økinum, so hava oljufeløg tríggjar góðar orsakir til at koma inn í føroyskt øki at leita:

- **Cross-border oilfields opportunities** – hetta eru oljufelt, sum møguliga ganga tvørturum markið millum Bretland og Føroyar. Hesin møguleikin er umrøddur við bretsku kolvetnismyndugleikarnar og orsøk er at halda, at tað eru slík oljufelt. Ongi av hesum eru tó boraði enn.
- **Nearfield opportunities** – hetta eru smærri oljufelt, sum eru “nær við”størri útbygd oljufelt, har allur infrastrukturur er tøkur við rørleiðingum, framleiðsluplattformum o.s.fr. Oljufeløg leita altíð eftir møguleikum í nærumhvørvinum hjá størri oljufeltum, fyri at fáa meira burturúr íløguni í infrastrukturin. Tey mest eyðsæddu oljufeltini á bretskari síðu, sum kundu hugsast at farið at leita eftir “nearfield opportunities”, eru Rosebank og Cambo, sum eru ávikavist 11 og 5 km frá føroyska markinum. Hvørki av hesum hava tó fingið endaligt loyvi at fara undir framleiðslu enn, hóast serliga Rosebank nærum er klárt at fara í gongd.
- **Nýggj leitimið** – Jarðfrøðingar á Jarðfeingi hava, saman við leitiserfrøðingi frá oljuvinnuni, eyðmerkt nøkur støð innanfyri tey higartil útbjóðaðu økini, har sannlíkindini at finna kolvetni eru størri enn har oljufeløgini higartil hava leitað og borað. Orsøkin er, at vitanin um undirgrundina eystanfyri Føroyar er størri, enn oljufeløgini vistu tá. Talan er bæði um møgulig smá oljufelt, sum kunnu virka sum “nearfield opportunities” men eisini um møguliga størri kolvetnisfund, ið kunnu framleiðast sjálvstøðugt.

At enda varð sagt, at um oljufeløgini hinvegin taka seg burtur úr Hetlandsrennuni, t.d. tí eykaskatturin (windfall tax) á framleiðsluni heldur fram óbroyttur, ella tí Bretland ikki loyvir meira leiting eftir kolvetni í bretskum øki, so minkar møguleikin munandi fyri at fáa nakað oljufelag inn á føroyskt øki at leita. Í løtuni tykist huglagið tó at venda í Bretlandi, har tað

verður meira vanligt at meina, at so leingi bretar brúka kolvetni, kunnu tey eisini loyva sær at framleiða tað.

Nógv er broytt síðani 1999-2000, tá upprunaliga skattaskipanin varð gjørd. Oljuprísir, skattaskipanir í grannalondum, kostnaðir av útbygging og framleiðslu o.a. Lógirnar og metingarnar, sum lógu til grund fyri upprunaligu skattaskipanini, vórðu gjørdar í eini tíð, tá ið oljuprísurin lá umleið 18-20 USD fyri tunnuna. Seinnu árini hevur oljuprísurin ligið uppi á 70-80 USD fyri tunnuna, men hevur eisini verið heilt uppi á oman fyri 120 USD fyri tunnuna.

Nýggjar leiðir eru bodnar fram til leiting og framleiðslu á økjum, m.a. í arktiska økinum, sum ikki vórðu mett gjørlig tá av tekniskum ávum.

Tað eigur at vera so, at lógir og reglur verða eftirmettar og endurskoðaðar í samsvari við broytingar í heiminum og í samfelagnum, og í sambandi við tøknilig nýbrot og nýggja vitan. Undir hesum eisini, at vit støðugt meta um, hvørt lógir og reglur røkka teimum endamálum, tey vórðu ætlað til, ella ikki.

Høvuðsendamálið við skattaskipanini, og eisini hesum uppskotinum er, at tilfeingisrentan av kolvetni í størstan mun kemur øllum føroyingum til góðar. Tað ger hon bert, um skattaskipanin ikki er ein forðing fyri, at kolvetni verður útvunnið í Føroyum, tí tá verður ongin leiting, og tískil heldur ongin olja funnin, og soleiðis kemur heldur ongin tilfeingisrenta til høldar. Um tað er so, at skattaskipanin er ein forðing fyri, at leitað verður eftir kolvetni undir Føroyum, ber ikki til at siga við vissu. Men sigast kann, at tað er eyðsæð, at áhugin fyri at leita eftir kolvetni undir Føroyum er avmarkaður. Tað eru longu nógv ár síðani, at oljuleitingin undir Føroyum minkaði burtur í einki. Tað er tí okkurt, sum bendir á, at oljufeløg meta jarðfrøðiligu óvissurnar og váðarnar ov stórar í mun til tann møguliga vinningin, ið kann fáast, um leitingin eydnast.




*Mynd 1. Brunnar boraðir á føroyska landgrunninum, og dýpið á teimum. Eisini vísir myndin olju- og gasskeldur á bretskum øki. Oljukeldurnar eru vístar við grønum og gasskeldurnar við reyðum liti. Kelda: Jarðfeingi*

Jarðfeingi hevur í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini fyri 2025 upplýst Løgtingsins Fíggjarnevnd um, at oljufeltini, sum eru næst føroyska markinum, eru Rosebank, ið bert er 11

km frá føroyska markinum, og sum í løtuni verður útbygt til framleiðslu, og Cambo, ið er 5 km frá markinum, og sum bíðar eftir loyvi frá bretsku myndugleikunum at verða útbygt. Um og tá hesi byrja framleiðsluna, er møguleiki fyri, at oljufeløgini í hesum báðum feltunum fara at hyggja í nærumhvørvinum, undir hesum í føroyskum øki, eftir meira kolvetni. Um olja verður funnin í føroyskum øki, so kann tað hava týdning fyri, hvørt tað er lønsamt at útbyggja ella ikki, at tað er undirstøðukervi nærindis. Í onkrum førum kann tað vera gjørligt beinleiðis at knýta oljufelt saman við rørleiðingum, sum kann gera, at samlaði útbyggingarkostnaðurin gerst lægri.

Við at lækka skattatrýstið á oljuframleiðslu, kunnu Føroyar senda eitt signal til oljuvinnuna um, at Føroyar eru áhugaðar í at taka ímóti oljuleiting í føroyskum øki.

**Orsakir til uppskotið**

Oljuleitingin undir Føroyum hevur í stóran mun verið uppsteðgað seinnu árini, og hevur onki borivirksemi verið á landgrunninum.

Hesa tíðina hava granskarar á Jarðfeingi tó arbeitt við at greina alt tilfarið, ið oljufeløg, sum áður hava leitað í føroyskum øki, hava savnað, m.a. royndarboringar og seismikk. Úrslitið er ein 3D-myndil av áhugaverdum øki eystanfyri Føroyar.

Í framhaldi av hesum arbeiðinum er ætlanin hjá Jarðfeingi at framleiða leitimið í føroyskum øki, sum ætlanin síðani er at leggja fyri oljufeløgini, ið eru virkin hinumegin markið. Afturat sær hava føroysku granskararnir útlendska serfrøði í kolvetnisleiting. Open Door-skipanin er enn í gildi, ið merkir, at feløg við áhuga fyri føroyskum øki altíð kunnu senda landinum umsóknir um leiti- og framleiðsluloyvi.

*Oljugongdin í Bretlandi - ein unik støða fyri Føroyar*
Í grein inni á Orkan.fo verður greitt frá, at ongantíð áður síðani oljuævintýrið í Norðsjónum byrjaði í 1960-unum, hevur leitingin í bretskum øki verið so lítil, sum hon var í 2025.

Hetta er beinleiðis avleiðingar av einum politiskum vali hjá bretsku stjórnini, sum hevur gjørt av at varðveita serskattin (brandskattin) á olju- og gassvinnuna.

Samlaða skattabyrðan er nú 78 prosent, og hon skal eftir ætlan standa við heilt fram til 2030.

Avleiðingarnar síggja vit longu. Orkufeløg hava traðkað á bremsuna, sett íløgur á pausu og í summum førum sagt nógv fólk úr starvi. Sambært Financial Times og greiningarfyritøkuni Wood Mackenzie er leitingin eftir olju og gassi í Norðsjónum nú tann minsta síðani 1960-árini.

Umleið 15 milliardir pund í møguligum íløgum verða mettar at vera í stórum vanda fyri at verða strikaðar, tí feløgini í alsamt størri mun venda sær aðrastaðni.

Hetta er álvarsamt – ikki bert fyri vinnuna, men fyri Bretland sum heild. Meginfelagið hjá orkuvinnuni, Offshore Energies UK, hevur ávarað bretsku stjórnina um, at heldur henda kósin fram, fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar fyri orkutrygdina. Bretland er longu vorðið munandi meira bundið at innflutningi av olju og gassi, serliga úr Norra.

*Bretland stongir – Norra letur upp*
Samstundis sum Bretland leggur fót fyri nýggjum oljuvirksemi, er gongdin hinumegin markið júst tann øvugta. Í norskum øki verða nýggj olju- og gassfund gjørd eitt fyri og annað eftir. Har hevur stjórnin valt at lata møguleikarnar standa opnar fyri leiting og útbygging, tí hon metir orkutilfeingið at vera ein týðandi part av bæði búskapinum og orkutrygdini.

Hetta merkir at Bretland, í staðin fyri at økja um egna framleiðslu, nú innflytur meira olju og gass úr Norra. Munurin millum hesi bæði londini vísir greitt, hvussu stóran týdning politiskir karmar og skattapolitikkur hava fyri, hvar orkufeløg velja at leggja sínar íløgur.

*Hvat merkir hetta fyri Føroyar?*
Í 2026 skal bretska stjórnin taka fleiri týðandi avgerðir um framtíðina hjá olju- og gassvinnuni millum Hetland og Føroyar. Avgerðir sum eisini kunnu fáa stóran týdning fyri føroysku oljutilgongdina.

Ein lyklaspurningur er Rosebank-leiðin eystan fyri Føroyar. Her bíðar nýggja orkufelagið Adura, stovnað av Shell og Equinor, eftir endaligari avgerð frá bretsku stjórnini.

Nógv bendir á, at Rosebank kortini fær grønt ljós til útbygging, hóast generella mótstøðu móti oljuvinnuni. Gerst tað veruleiki er sannlíkt, at aðrar leiðir við markið, so sum Cambo og Tornado, eisini fara at fylgja aftaná.

Og júst her liggur ein upplagdur møguleiki fyri Føroyar.

*Føroyar kunnu verða alternativið*
Føroyar liggja beint við bretskt øki og eitt øki, har stórar olju- og gasskeldur longu eru funnar. Seinastu kanningar og gransking hjá Jarðfeingi geva framvegis góðar vónir um fund í føroyskum øki – ikki minst tí, at nógv er funnið beint hinumegin markið.

Føroyar eiga at vera eitt greitt og álítandi alternativ fyri altjóða orkuvinnuna – við støðugum karmum, greiðari fyrisiting og einum jaligum móttøkuanda.

Men tað krevur, at vit eisini tora at handla.

*Tíðin er búgvin*
Føroyar kunnu millum annað bjóða kappingarførar skattatreytir – til dømis við at lækka skattatrýstið niður móti 50 prosentum. Tá hevði munurin millum Føroyar og Bretland verið umleið 28 prosentstig, og tað hevði verið ein verulig gularót.

Slík stig vórðu longu umrødd í uppskoti hjá andstøðuni fyrr í ár. Nú eru umstøðurnar broyttar soleiðis, at hesi uppskot eru enn meira viðkomandi.

*Føroyski búskapurin, arbeiðspláss og framtíðin*
Orsøkin til at vit taka hetta upp aftur nú, er búskaparligi veruleikin í Føroyum. Okkara høvuðsvinnur eru undir trýsti og vit hava tørv á fleiri beinum at standa á.

Rætt umsitið kann tilfeingið í undirgrundini gerast ein stór hjálp, bæði tá ið tað snýr seg um arbeiðspláss og avleitt virksemi, útflutning, spennandi útbúgvingar og vitanartung størv, sum fáa fólk at venda heimaftur úr útlandinum.

Júst hetta snýr seg sanniliga um framtíðina hjá teimum ungu og um útbúgvingar, arbeiði og møguleikan at síggja eina framtíð í Føroyum.

*Eitt felags mál*
Hetta eigur at verða eitt tvørpolitiskt framtíðarmál.

Tí vilja vit enn einaferð rætta hondina út til samgonguflokkarnar og ynskja landsstýrinum og nýggja Tilfeingis- og vinnumálaráðnum góða eydnu við arbeiðinum.

Olja og gass í undirgrundini eru føroyskt tilfeingi, og tað er rætt at hugsa hetta saman við øðrum náttúrutilfeingi.

Samstundis mugu vit vera erlig um, at tað grøna umskiftið ikki kemur av sær sjálvum – tað skal fíggjast. Júst her kunnu olju- og gassvinnan hava ein avgerandi leiklut. Inntøkur frá hesum virksemi kunnu nýtast til at fíggja grønar íløgur, og gera umskiftið bæði skjótari og meira skynsamt.

Evropa er í eini sera torførari støðu, og hon versnar, tá talan er um orku t.e. olju og her sertakliga gass. Eftir at hava stongt úti russiskt gass eru vit farin at innflyta stórar nøgdir av gassi úr USA og longu nú ljóðar, at Evropa má ansa eftir ikki at gerast eins bundið at amerikonskum og miðeysturgassi sum russiskum.

Í Evropa eru vit eisini í teirri merkisverdu støðu, at her eru kreftir, sum toga báðar vegir. Norra hevur gjørt greitt, at tað vil gera alt fyri at menna sína gassframleiðslu, soleiðis at tað kann lætta um støðuna og veita Evropa orkutrygd eisini. Men samtíðis eru vit í Evropa eitt nú við at seta strong nettonull mál við at kvala ta gassframleiðslu, Evropa sjálvt kundi staðið fyri.

Her seta vit fót fyri okkum sjálvum, og her koma vit so til støðuna, Føroyar eru í. Sum ávíst í svarinum frá landsstýrinum til Fíggjarnevndina, so eru tekin til og prógv um, at stórar nøgdir av gassi helst finnast í føroysku undirgrundini. Her eiga vit at brúka ta momentum, sum er í Evropa, og av álvara og sjónligt bjóða Føroyar fram til at veita gass til tað hugrandi Evropa, tí vit meina, at her eru stórir møguleikar at finna nógv gass, vísandi til bæði Anne Marie fundið eins og stóru gassstrukturarnar so sum Kúlubøkuna o.a. sum vóru partur av fyrrverandi loyvisumførum.

At so nógv gass er funnið hinumegin markið, og at so mong feløg nú fara miðvíst at leita eftir gassi eystan og norðan fyri Føroyar er eisini prógv um, at tað helst finst um okkara leiðir eisini.

Nú er løtan. Men vit mugu handla skjótt – og vit mugu tora at taka málið upp aftur.

**Heimseftirspurningurin eftir olju komandi árini minkar ikki heilt burtur**

Sambært nýggjastu frágreiðing frá altjóða orkufelagsskapinum IEA, World Energy Outlook 2024, fer heimurin at hava tørv á fossilari orku í rúma tíð afturat, hóast framkomnu londini í vesturheiminum fara at minka um sín eftirspurning eftir olju fram ímóti ár 2050. Hóast sera stórar óvissur, hevur IEA til hetta gjørt metingar av trimum høvuðsførum (scenario), sum eru nevnd STEPS, APS og NZE. Hesi føri eru allýst soleiðis:

- STEPS (Stated Policies Scenario) er tann besta metingin sambært teirri kós, sum orkueftirspurningurin hevur í dag sambært nýggjastu tølum um eftirspurning, tøkni, kostnað og greining av politiskum átøkum kring heimin.
- APS (Announced Pledges Scenario) er førið, ið lýsir, hvussu tað hevði sæð út, um øll mál sett av heimsins tjóðum høvdu verið fylgd fult og til tíðina.
- NZE (Net Zero Emissions by 2050 Scenario) er førið, ið lýsir, hvussu eftirspurningurin má vera fyri at náa málinum um í 2050 at minka útlátið í ein so stóran mun, at tað ber til at avmarka globalu upphitingina til 1,5 stig Celsius.

Mynd 2 niðanfyri vísir metingina av heimsorkueftirspurninginum fyri tey trý høvuðsførini.




*Mynd 2. Mettur heimsorkueftirspurningur fram til 2050. Víst verða 3 føri (scenario), alt eftir hvussu væl heimsins umlegging til orkukeldur við lægri útláti fer at eydnast. Í øllum førum fer heimurin at brúka stóra nøgd av fossilari orku í 2050 (brúnu, reyðu og korkalittu økini).Eindin á grafinum er EJ = Exajoule. Tey trý førini eru STEPS = Stated Policies Scenario, APS = Announced Pledges Scenario; NZE = Net Zero Emissions by 2050 scenario. (Kelda: IEA, World Energy Outlook 2024, Total final consumption by fuel and scenario 2023-2050)*

Innan fyri STEPS førið eru eisini óvissur, men sjálvt við teimum mettu minkingunum og umleggingum til alternativar orkukeldur, fer heimseftirspurningurin at vera ímillum 95 og 105 mió. føt um dagin (mb/d). Hetta sæst í mynd 3 niðanfyri. Óvissan, ið myndin vísir frá 2025 og fram, er grundað á óvissuna í trimum høvuðsviðurskiftum: hvussu skjót umleggingin frá olju til gass fer at vera, serliga í Miðeystri; hvussu stórur partur av el-akførunum verða plug-in hybrid akfør; og hvussu stórur vøksturin í nýtsluni av el-akførum verður.




*Mynd 3. Mettur heimseftirspurningur eftir olju fram til 2035 í STEPS førinum. Sjálvt í førum við skjótari umlegging til alternativar orkukeldur, fer heimseftirspurningurin at vera millum 95 og 100 mió. føt um dagin (mb/d). (Kelda: IEA, World Energy Outlook 2024, Global oil demand in the STEPS and key sensitivities, 2015-2035)*

Heimsins eftirspurningur eftir olju sær í hesum STEPS føri út til at fara at minka eitt sindur, men sum mynd 4 niðanfyri vísir, væntast minkingin í oljueftirspurningi mest at koma úr Evropa og Norðuramerika.




*Mynd 4. Broyting (í %) í heimseftirspurningi eftir olju í ymsum heimspørtum 2023-2035. Væntað verður, at eftirspurningurin eftir olju í Evropa fer at minka við 3,2 mió. føtum um dagin (mb/d), og Norðuramerika væntast at minka við 3,5 mió. føtum um dagin (mb/d). Hetta sama tíðarskeið fara aðrir heimspartar væntandi at økja um sín eftirspurning eftir olju. (Kelda: IEA, World Energy Outlook 2024, Change in global oil demand in selected regions 2023-2035)*

Niðurstøðan sær út til at vera, at uttan mun til um ein kundi ynskt sær, at umleggingin til grøna orku gekk skjótari, so verður tað tørvur á fossilari orku í heiminum í rúma tíð afturat.

### Tørvur á olju úr tryggum londum

Serliga eftir at Russland gjørdi innrás í Ukraina, er støðan á heimsmarknaðinum fyri olju broytt, soleiðis at tað nú í størri mun enn áður er týðandi, at vesturheimurin hevur atgongd til egna orku, og ikki er tongdur at londum, sum ikki virða mannarættindi og demokrati.

Tá ið vesturheimurin í stóran mun steðgaði við at keypa olju og gass úr Russlandi, kom gongd á eina umskipan av oljuhandlinum í heiminum. Sambært uppgerð frá Altjóða Orkufelagsskapinum (IEA) í Oil Market Report hevur kríggið í Ukraina ført við sær, at lond sum Kina, Turkaland og India eru tættari knýtt at Russlandi og nú keypa meginpartin av oljuni haðani. Hetta er broytt í stóran mun frá áðrenn kríggið, tá ið vesturheimurin keypti meginpartin av russisku oljuni. Nú verður bert ein heilt lítil partur av russisku oljuni keyptur av vesturheiminum. Hendan gongd skundar undir, at heimurin býtir seg upp í blokkar við innanhýsis samhandli. Føroyar eru eyðsæð partur av vesturheiminum, og um so er, at kolvetni er í føroyskum øki, kunnu Føroyar fara at hava ein týðandi leiklut í og ábyrgd av at vera við til at tryggja orkuveitingina í vesturheiminum.

Veitingartryggleiki av týðandi tilfeingi, undir hesum eisini orku, varð eisini nevndur sum ein av størstu váðunum, tá ið heimsins leiðarar í World Economic Forum mettu um størstu váðarnar í heiminum í frágreiðingini Global Risk Report 2024. Hetta vísir, at heimsins leiðarar eru ótryggir við støðuna og atgongdina til týðandi tilfeingi so sum orku. Hetta er ein sterk ábending um, at tørvurin á olju úr tryggum, vesturlendskum londum fer at halda fram, inntil vit hava megnað at gera okkum óheft av fossilum orkukeldum.

### Galdandi lóggáva

Tá uppskot til kolvetnisskattalóg varð samtykt um aldarskiftið, vísti landsstýrið í viðmerkingunum til, at ein kolvetnisskattalóg skal vera við til at áseta alt skattastigið fyri sjálvt virksemið í sambandi við at framleiða og selja kolvetni. Skipanin, ið tá varð samtykt, umfataði hesar partar:

- Vanligur kolvetnisskattur
- Serligur kolvetnisskattur (serskattur)
- Framleiðsluavgjald (royalty)

Fyrstu loyvisumførini umfataðu eisini aðrar skyldur, so sum arbeiðsskyldur og skyldur at førleikamenna føroyingar til eina framtíðar oljuvinnu.

Víst varð tá eisini á týdningin av, at búskaparliga byrðan frá heildarkrøvunum, t.e. skattum og loyvisskyldum, skal verða sammett við metingarnar av útlitunum fyri at finna kolvetni í føroyska økinum. Sagt varð, at í hesum sambandi er neyðugt, at oljuleiting kring Føroyar vísir seg at vera kappingarfør við íløgumøguleikar, ið eru at finna í sambandi við oljuleiting aðrastaðni. Sagt varð, at tað skal vera samanhangur ímillum, hvussu búskaparliga áhugavert økið er jarðfrøðiliga, og hvussu hart møgulig framtíðar oljuframleiðsla verður skattað.

Framleiðsluavgjaldið (royalty) verður ásett í sjálvum loyvunum, ið verða latin til oljuleiting og -framleiðslu. Tey fyrstu árini var ásett í loyvunum, at framleiðslugjaldið skuldi vera 2%.




*Mynd 5. Oljuskattaskipanin frá 1999-2019. Skipanin hevði við sær framleiðslugjald, at verða ásett í framleiðsluloyvinum.*

Føroyska oljuskattaskipanin er í einum føri broytt áður. Hetta var í sambandi við fimta útbjóðingarumfar, tá ið framleiðsluavgjaldið, ið varð ásett í sjálvum loyvunum, varð tikið burtur, soleiðis at onki framleiðslugjald skuldi gjaldast. Sostatt bleiv hægsta skattatrýstið flutt úr 57,1% niður í 56,2%, sum eisini víst á myndunum niðanfyri.




*Mynd 6. Galdandi oljuskattaskipan 2019-2024. Skipanin hevur ikki við sær framleiðslugjald.*

**Norska oljuskattaskipanin**

Í Noregi er nógv olja funnin, og nógvur infrastrukturur er kring størsta partin av norska landgrunninum. Tí hevur Noregi eisini eydnast at hava eitt av heimsins hægstu skattatrýstum á oljuframleiðslu.

Framleiðslugjald verður goldið fyri framleiðslu sambært loyvi, givið áðrenn 1972, við einum stigi, sum er 10%. Fyri loyvir, givin í tíðini ímillum 1972 og 1987, verður framleiðslugjaldið roknað eftir virðinum á framleiðslustaðnum við einum stigi úr 8% upp í 16%, eftir framleiddari mongd. Framleiðslugjald verður ikki goldið fyri nýggjari loyvir.

Felagsskatturin fram til 1975 var 42,8%. Árini 1975-91 var felagsskatturin 50,8% og í 1992-2013 var felagsskatturin 28%, men lækkaði stigvíst í tíðarskeiðnum 2014-2018 til núverandi støði, sum er 22%.

Síðan 1975 hevur serligur oljuskattur verið álagdur oman á vanliga felagsskattastigið. Síðani 2022 hevur hesin serskattur verið 71,8%.

Norska oljuskattaskipanin er sermerkt við at hava frádrátt fyri leitiútreiðslur, eisini hóast oljufelagið ongar inntøkur hevur at draga frá í, sum merkir, at norski staturin endurrindar ein part av leitiútreiðslunum árið eftir.

Hetta er grundað á prinsippið um, at ein skattaskipan helst skal vera so neutral sum gjørligt, soleiðis at ein oljuverkætlan, sum er lønandi áðrenn skatt, helst eisini skal vera lønandi eftir skatt.

Norska oljuskattaskipanin er sostatt samansett av vanligum felagsskatti á 22% og einum serskatti á 71,8%, sum tilsamans gevur eitt hægsta skattatrýst á 78% t.e. (100%-22%)*71,8% + 22% = 78%.

Umframt beinleiðis skattin, so luttekur norski staturin í oljuvinnuni bæði ígjøgnum partvísan eigaraskap í Equinor ASA (fyrrverandi Statoil) og Statens Direkte Økonomiske Engasjement (SDØE), sum er umsitið av felagnum Petoro AS.

**Bretska oljuskattaskipanin**

Bretland hevur eins og Noreg havt kolvetnisleiting og framleiðslu í mong ár. Hesa tíð eru nógvar broytingar gjørdar í skattaskipanini. Ein av orsøkunum man vera tey ógvuliga skiftandi inntøkuviðurskiftini í ídnaðinum. Rentabiliteturin hevur sjálvsagt verið ávirkaður bæði av stórum príshækkingum og stórum prísfalli, og aftrat hesum koma stórar kostnaðarskerjingar seinastu árini, sum stava frá einari samanseting av betri tilvitan um kostnað og betri tøknifrøði.

Felagsskatturin á bretskari oljuframleiðslu er 30% við einum eykastigi á 10%.

Í mai 2022 varð innførdur ein nýggjur serskattur á oljuframleiðslu á 25%, sonevndi ‘Energy Profits Levy’. Í januar 2023 varð hesin hækkaður til 35%, og í november 2024 varð hesin hækkaður til 38%. Hetta er ein tíðaravmarkaður skattur, sum skuldi fara úr gildi í 2028, men tíðarskeiðið er nú eisini longt til 2030.

Við hesi seinastu hækking er samlaði skatturin á kolvetnisvinnu komin uppá 78%, sum er sama støði sum í Noregi.

Ein vansi fyri Føroyar við herdu treytunum fyri at reka kolvetnisvinnu í bretskum øki er, at vandi er fyri, at leitingin eftir olju steðgar upp, og at tað sostatt ikki fara at koma fleiri oljufelt nærindis føroyska økinum. Soleiðis gerast sannlíkindini fyri at kunna gagnnýta verandi infrastruktur til framleiðslu í føroyskum øki tess minni.

Hinvegin kann omanfyri nevnda herðing av skattligu treytunum í Bretlandi gera, at oljufeløgini stinga í sekkin og fara at leita eftir olju aðrastaðni í heiminum, møguliga eisini í Føroyum.

## Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at fáa gongd á oljuvirksemið í Føroyum aftur. Hetta uppskotið sendir eitt signal til oljuvinnuna um, at Føroyar vilja taka væl ímóti nýggjum oljuleitingarvirksemi. Føroyar hava longu eina trygga og støðuga skattaskipan, men hon er ment í einari tíð, tá ið oljuleitingin í Norðuratlantshavi var á einum heilt øðrum støði enn nú.

Politiska skipanin er lutfalsliga trygg og støðug, og tað er ósannlíkt, at framtíðar landsstýri og Løgting í Føroyum fara at broyta skattareglurnar aftaná, tá ið oljufeløgini eru komin inn, og hava gjørt íløgur í Føroyum. Politiskt støðufesti er, at tá avtalur verða gjørdar við Føroya landsstýri, so verður staðið við tær.

Endamálið við uppskotinum er tí at lækka vanliga kolvetnisskattin úr 27% niður í 18%, soleiðis at vanligi kolvetnisskatturin er á sama støði sum partafelagsskatturin.

## Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið leggur upp til at venda aftur til upprunaligu ásetingina í kolvetnisskattalógini, har vanligur kolvetnisskattur varð roknaður við sama satsi sum vanligur partafelagsskattur. Í verandi støðu er vanligi partafelagsskatturin 18%, meðan vanligur kolvetnisskattur verður roknaður við satsinum 27%. Mynd 7 niðanfyri vísir, hvussu uppskotið skjýtur upp at broyta oljuskattaskipanina. Í mun til Mynd 6 omanfyri sæst, at markskattatrýstið av møguligum oljuskattainntøkum lækkar úr 56,2% niður í 50,8%.




*Mynd 7. Uppskot til oljuskattaskipan 2025-. Vanligi kolvetnisskatturin verður her lækkaður til 18%, sum er sama støði sum vanligi partafelagsskatturin.*

Mett verður, at ein slík lækking fer at gera tað lættari hjá Jarðfeingi at marknaðarføra føroyska økið, við at føroysku myndugleikarnir senda eitt greitt signal um, at oljuvinna er vælkomin til Føroya.

**Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

**Avleiðingarnar av uppskotinum**

Í metingunum av møguligum avleiðingum av uppskotinum verður lagt til grund, at uppskotið fer at hava við sær, at útvinning av kolvetni fer í gongd á føroyskum øki.

**Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar á fíggjarlógini komandi ár. Um tað eydnast at fáa oljuleiting í gongd í Føroyum og møguliga eisini oljuframleiðslu, kann hetta virksemi hava við sær stórar positivar avleiðingar fyri fíggjarligu støðu landsins.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Uppskotið hevur ikki við sær aðrar umsitingarligar avleiðingar enn at broyta ein skattasats og førir ikki við sær hægri umsitingarligar byrðar. Tað fer í besta føri at ganga fleiri ár, áðrenn ein kolvetnisinntøka skal skattast eftir hesum ásetingum.

**Avleiðingar fyri vinnuna**

Uppskotið kann hava við sær eina jaliga avleiðing fyri vinnuna á tann hátt, at útvinning av kolvetni kann gerast meiri lønsamt enn áður.

Leitivirksemi kann skapa nógv avleitt virksemi. Fleiri føroysk feløg veittu tænastur í sambandi við leitingarnar, ið hava verið, og nógv føroysk feløg eru virkin og veita tænastur í frálandavinnuni aðrastaðni. Umframt at hava tørv á hópin av tænastuveitingum, so rindaðu oljufeløgini føroyska landskassanum meira enn 150 milliónir krónur i víddargjøldum í sambandi við tað virksemið, sum var í føroyskum øki.

**Avleiðingar fyri umhvørvið**

Uppskotið er ein broyting í kolvetnisskattalógini, og hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið í sjálvum sær, men um uppskotið kann føra við sær, at kolvetnisleiting og -framleiðsla fer í gongd í føroyskum øki, so kann hetta virksemi hava ávirkan á umhvørvið.

Slíkt virksemi er regulerað í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023, har serliga kap. 4 setur treytir til loyvishavarar viðvíkjandi meting av avleiðingum fyri umhvørvið.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Uppskotið hevur ikki ávirkan á ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**Millumtjóðasáttmálar á økinum**

Lógaruppskotið hevur onga ávirkan á millumtjóðasáttmálar.

**Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

Lógaruppskotið hevur onga ávirkan á tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**Markaforðingar**

Lógaruppskotið hevur ongar markaforðingar við sær.

**Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**Skattir og avgjøld**

Lógaruppskotið broytir í skattaskipanini fyri skatting av kolvetni. Í løtuni er ongin framleiðsla av kolvetni, so uppskotið hevur ikki neiliga ávirkan á verandi fíggjarligu støðu landskassans. Ætlanin er, sum nevnt omanfyri, at uppskotið skal eggja til oljuleiting og vónandi fáa gongd á oljuframleiðslu, men tað ber ikki til ítøkiliga at vita, í hvønn mun hetta lógaruppskot ávirkar áhugan fyri at leita í føroyskum øki.

Um so er, at tað eydnast einum oljufelagi at finna olju í rakstrarverdum nøgdum í Føroyum, so er óvissan um støddina á møguligum oljufelti so stór, at tað ikki ber til at gera eina meiningsfulla forsøgn um skattainntøkur. Hinvegin ber til at gera roknidømi, sum kann lýsa, hvussu oljuskattaskipanin kann fara at ávirka og skatta oljufelt, ið møguliga verða funnin í føroyskum øki.

**Roknidømi við føroysku oljuskattaskipanini – verandi og uppskotið**

Fyri at síggja júst, hvussu oljuskattaskipanin virkar, er neyðugt at gera eina modell oljuleið við framleiðsluprofili, leitiútreiðslum, menningarútreiðslum, framleiðsluútreiðslum og burturbeiningarútreiðslum.

Eitt roknidømi er gjørt við einari oljuleið við umleið 550 mió. føtum. Her er tikið støði í einari oljuleið, meinlík oljuleiðini Johan Castberg í Barentshavinum, haðani oljuframleiðsla er um at byrja. Sambært norsku oljumyndugleikunum, Norsk Petroleum, er Johan Castberg ein oljuleið við mettum oljutilfeingi á 450-650 mió. føt, sum í hesum roknidømi er rundað til 550 mió. føt. Oljuleiðin verður útbygd við einum sonevndum FPSO (floating production, storage and offtake) framleiðsluskipi. Mett verður, at kostnaðarmetingarnar til roknidømið eru so nær veruleikanum sum gjørligt, tá ið metast skal um kostnaðin av leiting, útbygging og framleiðslu í Føroyum.




*Mynd 8. Framleiðsluprofilur til roknidømi*

Sjálvsagt eru óvissur tongdar at slíkum modell-útrokningum, og metingum um framtíðar útbyggingar, kostnaðir og prísir. Íløgan í útbyggingina er mett at vera 86 mia. kr. Ein av týdningarmiklastu fortreytunum er fortreytin um oljuprís. Oljuprísurin broytist nógv, sum sæst á myndini niðanfyri, ið vísir Brent oljuprísin seinastu 10 árini. Sum sæst, hevur oljuprísurin verið ímillum 20 og 128 USD fyri fatið. Seinastu tíðina hevur prísurin tó ligið umleið 75 USD fyri fatið, og tað verður tí brúkt sum grundarlag undir útrokningunum.




*Mynd 9. Oljuprísur 2014-2024 (Brent Crude, USD/fat)*

Tabell 1 niðanfyri vísir roknidømi við einum oljuprísi á 75 USD/fat við verandi skattaskipan, har vanligur kolvetnisskattur (partafelagsskattur) er 27%. Tabell 2 vísir roknidømi við uppskoti um vanligan kolvetnisskatt á 18%.

| Stødd á oljuleið: 550 mió. føt (75 USD/fat) (Mió. kr.) | Søluvirði/inntøkur | Leiti-, gagnmetingar-, og íløguútreiðslur | Rakstrarútreiðslur | Vanligur kolvetnisinntøku skattur | Serskattur | Netto peningastreymur hjá oljufelagi | Inntøka landskassans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2025 | 0 | 1.435 | 0 | 0 | 0 | -1.435 | 0 |
| 2026 | 0 | 1.471 | 0 | 0 | 0 | -1.471 | 0 |
| 2027 | 0 | 1.508 | 0 | 0 | 0 | -1.508 | 0 |
| 2028 | 0 | 8.902 | 0 | 0 | 0 | -8.902 | 0 |
| 2029 | 0 | 9.125 | 0 | 0 | 0 | -9.125 | 0 |
| 2030 | 0 | 9.353 | 0 | 0 | 0 | -9.353 | 0 |
| 2031 | 7.778 | 9.587 | 3.523 | 0 | 0 | -5.332 | 0 |
| 2032 | 25.056 | 9.826 | 4.815 | 0 | 0 | 10.415 | 0 |
| 2033 | 28.017 | 10.072 | 4.935 | 2.928 | 0 | 10.082 | 2.928 |
| 2034 | 28.718 | 10.324 | 5.059 | 3.564 | 0 | 9.772 | 3.564 |
| 2035 | 29.436 | 147 | 5.185 | 4.559 | 0 | 19.545 | 4.559 |
| 2036 | 27.154 | 0 | 5.315 | 4.504 | 0 | 17.335 | 4.504 |
| 2037 | 25.050 | 0 | 5.448 | 4.318 | 0 | 15.284 | 4.318 |
| 2038 | 23.108 | 0 | 5.584 | 4.049 | 0 | 13.475 | 4.049 |
| 2039 | 21.318 | 0 | 5.723 | 3.733 | 0 | 11.861 | 3.733 |
| 2040 | 19.665 | 0 | 5.866 | 3.391 | 0 | 10.408 | 3.391 |
| 2041 | 18.141 | 0 | 6.013 | 3.041 | 91 | 8.997 | 3.131 |
| 2042 | 16.735 | 0 | 6.163 | 2.691 | 788 | 7.093 | 3.479 |
| 2043 | 15.438 | 0 | 6.317 | 2.348 | 677 | 6.096 | 3.025 |
| 2044 | 14.242 | 0 | 6.475 | 2.017 | 575 | 5.175 | 2.592 |
| 2045 | 13.138 | 0 | 6.637 | 1.699 | 480 | 4.322 | 2.179 |
| 2046 | 12.120 | 0 | 6.395 | 1.506 | 422 | 3.797 | 1.928 |
| 2047 | 11.181 | 0 | 6.162 | 1.328 | 369 | 3.322 | 1.697 |
| 2048 | 10.314 | 0 | 5.937 | 1.163 | 321 | 2.893 | 1.484 |
| 2049 | 9.515 | 0 | 5.720 | 1.011 | 278 | 2.505 | 1.289 |
| 2050 | 8.777 | 0 | 5.511 | 872 | 239 | 2.154 | 1.112 |
| 2051 | 8.097 | 0 | 5.310 | 746 | 204 | 1.837 | 950 |
| 2052 | 7.470 | 0 | 5.116 | 631 | 172 | 1.550 | 803 |
| 2053 | 6.891 | 0 | 4.930 | 526 | 143 | 1.291 | 670 |
| 2054 | 6.357 | 0 | 4.750 | 432 | 118 | 1.058 | 549 |
| 2055 | 5.864 | 0 | 4.576 | 346 | 94 | 848 | 440 |
| 2056 | 5.410 | 0 | 4.409 | 269 | 73 | 658 | 342 |
| 2057 | 4.990 | 0 | 4.248 | 200 | 54 | 488 | 254 |
| 2058 | 4.604 | 0 | 4.093 | 137 | 37 | 336 | 175 |
| 2059 | 4.247 | 0 | 3.944 | 81 | 22 | 199 | 104 |
| 2060 | 3.918 | 19.226 | 3.800 | 0 | 0 | -19.108 | 0 |
| | 422.749 | 90.974 | 157.960 | 52.090 | 5.160 | 116.565 | 57.250 |

*Tabell 1. Útrokning av skatti við verandi skattaskipan. Roknað verður við einum oljuprísi á 75 USD/fat. Her verður roknað við skattligum endurgjaldi fyri avtøkukostnað. Enn er ikki gjørt av, hvussu hesin spurningur eigur at verða handfarin.*

| Stødd á oljuleið: 550 mió. føt (75 USD/fat) (Mió. kr.) | Søluvirði/inntøkur | Leiti-, gagnmetingar-, og íløguútreiðslur | Rakstrarútreiðslur | Vanligur kolvetnisinntøku skattur | Serskattur | Netto peningastreymur hjá oljufelagi | Inntøka landskassans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2025 | 0 | 1.435 | 0 | 0 | 0 | -1.435 | 0 |
| 2026 | 0 | 1.471 | 0 | 0 | 0 | -1.471 | 0 |
| 2027 | 0 | 1.508 | 0 | 0 | 0 | -1.508 | 0 |
| 2028 | 0 | 8.902 | 0 | 0 | 0 | -8.902 | 0 |
| 2029 | 0 | 9.125 | 0 | 0 | 0 | -9.125 | 0 |
| 2030 | 0 | 9.353 | 0 | 0 | 0 | -9.353 | 0 |
| 2031 | 7.778 | 9.587 | 3.523 | 0 | 0 | -5.332 | 0 |
| 2032 | 25.056 | 9.826 | 4.815 | 0 | 0 | 10.415 | 0 |
| 2033 | 28.017 | 10.072 | 4.935 | 1.952 | 0 | 11.058 | 1.952 |
| 2034 | 28.718 | 10.324 | 5.059 | 2.376 | 0 | 10.960 | 2.376 |
| 2035 | 29.436 | 147 | 5.185 | 3.039 | 0 | 21.064 | 3.039 |
| 2036 | 27.154 | 0 | 5.315 | 3.003 | 0 | 18.837 | 3.003 |
| 2037 | 25.050 | 0 | 5.448 | 2.879 | 0 | 16.724 | 2.879 |
| 2038 | 23.108 | 0 | 5.584 | 2.700 | 0 | 14.825 | 2.700 |
| 2039 | 21.318 | 0 | 5.723 | 2.489 | 220 | 12.886 | 2.709 |
| 2040 | 19.665 | 0 | 5.866 | 2.261 | 1.154 | 10.384 | 3.415 |
| 2041 | 18.141 | 0 | 6.013 | 2.027 | 1.010 | 9.091 | 3.037 |
| 2042 | 16.735 | 0 | 6.163 | 1.794 | 878 | 7.900 | 2.672 |
| 2043 | 15.438 | 0 | 6.317 | 1.565 | 756 | 6.800 | 2.321 |
| 2044 | 14.242 | 0 | 6.475 | 1.344 | 642 | 5.780 | 1.987 |
| 2045 | 13.138 | 0 | 6.637 | 1.133 | 537 | 4.831 | 1.670 |
| 2046 | 12.120 | 0 | 6.395 | 1.004 | 472 | 4.249 | 1.476 |
| 2047 | 11.181 | 0 | 6.162 | 885 | 413 | 3.721 | 1.298 |
| 2048 | 10.314 | 0 | 5.937 | 775 | 360 | 3.242 | 1.135 |
| 2049 | 9.515 | 0 | 5.720 | 674 | 312 | 2.809 | 986 |
| 2050 | 8.777 | 0 | 5.511 | 582 | 268 | 2.416 | 850 |
| 2051 | 8.097 | 0 | 5.310 | 497 | 229 | 2.061 | 726 |
| 2052 | 7.470 | 0 | 5.116 | 421 | 193 | 1.740 | 614 |
| 2053 | 6.891 | 0 | 4.930 | 351 | 161 | 1.449 | 512 |
| 2054 | 6.357 | 0 | 4.750 | 288 | 132 | 1.187 | 420 |
| 2055 | 5.864 | 0 | 4.576 | 231 | 106 | 951 | 336 |
| 2056 | 5.410 | 0 | 4.409 | 179 | 82 | 739 | 261 |
| 2057 | 4.990 | 0 | 4.248 | 133 | 61 | 548 | 194 |
| 2058 | 4.604 | 0 | 4.093 | 92 | 42 | 377 | 133 |
| 2059 | 4.247 | 0 | 3.944 | 54 | 25 | 224 | 79 |
| 2060 | 3.918 | 19.226 | 3.800 | 0 | 0 | -19.108 | 0 |
| | 422.749 | 90.974 | 157.960 | 34.727 | 8.053 | 131.035 | 42.780 |

*Tabell 2. Útrokning av skatti við uppskoti um vanligan kolvetnisskatt á 18%. Roknað verður við einum oljuprísi á 75 USD/fat. Her verður roknað við skattligum endurgjaldi fyri avtøkukostnað. Enn er ikki gjørt av, hvussu hesin spurningur eigur at verða handfarin.*

Um støði verður tikið í roknidømunum omanfyri, so hevur uppskotið ávirkan á skattainntøkuna av møguligari oljuframleiðslu í føroyskum øki. Skattainntøkurnar minka við, at skattasatsurin fyri vanligan kolvetnisskatt lækkar úr 27% í 18%. Hinvegin eru ongar skattainntøkur í dag, og óvist er, um tær nakrantíð koma.

Í tabell 3 niðanfyri sæst ein samandráttur av avleiðingunum av uppskotinum. Sum sæst, fer broytingin í hesum roknidøminum at føra við sær, at skatturin, sum partur av vinninginum, fer úr 33% niður í 25%.

Um vinningurin gerst størri, til dømis um oljuprísurin er hægri, fara skattainntøkurnar at økjast meiri enn tilsvarandi. Sum sæst á mynd 10 niðanfyri er vanligur kolvetnisskattur størsti

partur av samlaðu skattainntøkum landsins. Serligi kolvetnisskatturin er hinvegin í stóran mun tongdur at lønseminum hjá tí einstaka oljufeltinum, og tí kann hesin skattur fara at hava størri týdning, um lønsemið gerst heilt gott, og vinningurin heilt stórur. Víst verður eisini til mynd 7, sum vísir samlaða skattatrýstið í mun til lønsemið.

| Roknidømi við 75 USD/fat | Verandi skattaskipan | Uppskot |
|---|---|---|
| Intern renting av íløgu eftir skatt (hjá oljufelagi) | 20% | 21% |
| Skattur sum % av vinningi | 33% | 25% |
| Skattainntøkur | 57 mia. kr. | 43 mia. kr. |
| Nútíðarvirði av skattainntøkum (10%) | 14 mia. kr. | 10 mia. kr. |

*Tabell 3. Samandráttur av avleiðingum av uppskotinum. Roknidømi við oljuprísi á 75 USD/fat.*




*Mynd 10. Býti av inntøkum. Roknidømið við 75 USD/fat vísir, at størsti parturin av inntøkunum fer til íløgu og rakstur, meðan vanligur og serligur kolvetnisskattur svara til tilsamans 13% av inntøkunum í verandi skipan og 10% av inntøkunum í uppskotinum. Tað svarar til ávikavist 33% og 25% av vinninginum eftir íløgu- og rakstrarkostnaðir.*

Ein eginleiki, ið føroyska oljuskattaskipanin hevur, er, at hon er progressiv í mun til lønsemið hjá tí einstaka oljufeltinum. Eini av mest týðandi viðurskiftum, tá um lønsemi í oljuvinnuni ræður, er oljuprísurin. Sum víst omanfyri, kann hesin sveiggja nógv. Niðanfyri er eitt roknidømi sum vísir, hvussu nógvur skattur hevði komið inn, um oljuprísurin var 100 USD/fat.

Í tabell 6 niðanfyri sæst ein samandráttur av avleiðingunum av uppskotinum. Sum sæst, fer broytingin í hesum roknidøminum at føra við sær, at skatturin sum partur av vinninginum fer úr 42% niður til 41%.

Roknidømið vísir, at um lønsemið gerst sera gott frá oljuframleiðsluni, so økist skattatrýstið eisini av sær sjálvum og endar uppi á í mesta lagi 50,8%.

| Stødd á oljuleið: 550 mió. føt (100 USD/fat) (Mió. kr.) | Søluvirði/inntøkur | Leiti-, gagnmetingar-, og íløguútreiðslur | Rakstrarútreiðslur | Vanligur kolvetnisinntøkuskattur | Serskattur | Netto peningastreymur hjá oljufelagi | Inntøka landskassans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2025 | 0 | 1.435 | 0 | 0 | 0 | -1.435 | 0 |
| 2026 | 0 | 1.471 | 0 | 0 | 0 | -1.471 | 0 |
| 2027 | 0 | 1.508 | 0 | 0 | 0 | -1.508 | 0 |
| 2028 | 0 | 8.902 | 0 | 0 | 0 | -8.902 | 0 |
| 2029 | 0 | 9.125 | 0 | 0 | 0 | -9.125 | 0 |
| 2030 | 0 | 9.353 | 0 | 0 | 0 | -9.353 | 0 |
| 2031 | 10.371 | 9.587 | 3.523 | 0 | 0 | -2.739 | 0 |
| 2032 | 33.408 | 9.826 | 4.815 | 2.491 | 0 | 16.276 | 2.491 |
| 2033 | 37.356 | 10.072 | 4.935 | 5.914 | 0 | 16.436 | 5.914 |
| 2034 | 38.290 | 10.324 | 5.059 | 6.148 | 0 | 16.760 | 6.148 |
| 2035 | 39.247 | 147 | 5.185 | 7.208 | 0 | 26.707 | 7.208 |
| 2036 | 36.206 | 0 | 5.315 | 6.948 | 1.758 | 22.184 | 8.707 |
| 2037 | 33.400 | 0 | 5.448 | 6.573 | 3.177 | 18.203 | 9.749 |
| 2038 | 30.811 | 0 | 5.584 | 6.129 | 4.775 | 14.324 | 10.904 |
| 2039 | 28.423 | 0 | 5.723 | 5.651 | 4.262 | 12.786 | 9.914 |
| 2040 | 26.221 | 0 | 5.866 | 5.161 | 3.798 | 11.395 | 8.960 |
| 2041 | 24.189 | 0 | 6.013 | 4.673 | 3.376 | 10.127 | 8.049 |
| 2042 | 22.314 | 0 | 6.163 | 4.197 | 2.988 | 8.965 | 7.185 |
| 2043 | 20.585 | 0 | 6.317 | 3.737 | 2.632 | 7.897 | 6.370 |
| 2044 | 18.989 | 0 | 6.475 | 3.298 | 2.304 | 6.912 | 5.602 |
| 2045 | 17.518 | 0 | 6.637 | 2.881 | 2.000 | 5.999 | 4.881 |
| 2046 | 16.160 | 0 | 6.395 | 2.597 | 1.792 | 5.376 | 4.389 |
| 2047 | 14.908 | 0 | 6.162 | 2.334 | 1.603 | 4.809 | 3.937 |
| 2048 | 13.752 | 0 | 5.937 | 2.091 | 1.431 | 4.293 | 3.522 |
| 2049 | 12.686 | 0 | 5.720 | 1.867 | 1.275 | 3.824 | 3.142 |
| 2050 | 11.703 | 0 | 5.511 | 1.662 | 1.132 | 3.397 | 2.795 |
| 2051 | 10.796 | 0 | 5.310 | 1.475 | 1.003 | 3.009 | 2.478 |
| 2052 | 9.960 | 0 | 5.116 | 1.303 | 885 | 2.655 | 2.188 |
| 2053 | 9.188 | 0 | 4.930 | 1.146 | 778 | 2.334 | 1.924 |
| 2054 | 8.476 | 0 | 4.750 | 1.004 | 681 | 2.042 | 1.684 |
| 2055 | 7.819 | 0 | 4.576 | 874 | 592 | 1.776 | 1.466 |
| 2056 | 7.213 | 0 | 4.409 | 756 | 512 | 1.536 | 1.268 |
| 2057 | 6.654 | 0 | 4.248 | 649 | 439 | 1.318 | 1.088 |
| 2058 | 6.138 | 0 | 4.093 | 552 | 373 | 1.120 | 925 |
| 2059 | 5.662 | 0 | 3.944 | 464 | 314 | 941 | 777 |
| 2060 | 5.224 | 19.226 | 3.800 | 0 | 0 | -17.802 | 0 |
| | **563.665** | **90.974** | **157.960** | **89.785** | **43.880** | **181.066** | **133.665** |

*Tabell 4. Útrokning av skatti við verandi skattaskipan. Roknað verður við einum oljuprísi á 100 USD/fat. Her verður roknað við skattligum endurgjaldi fyri avtøkukostnað. Enn er ikki gjørt av, hvussu hesin spurningur eigur at verða handfarin.*

| Stødd á oljuleið: 550 mió. føt<br><br>(100 USD/fat)<br><br>(Mió. kr.) | Søluvirði/inntøkur | Leiti-, gagnmetingar-, og íløguútreiðslur | Rakstrarútreiðslur | Vanligur kolvetnisinntøkuskattur | Serskattur | Netto peningastreymur hjá oljufelagi | Inntøka landskassans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2025 | 0 | 1.435 | 0 | 0 | 0 | -1.435 | 0 |
| 2026 | 0 | 1.471 | 0 | 0 | 0 | -1.471 | 0 |
| 2027 | 0 | 1.508 | 0 | 0 | 0 | -1.508 | 0 |
| 2028 | 0 | 8.902 | 0 | 0 | 0 | -8.902 | 0 |
| 2029 | 0 | 9.125 | 0 | 0 | 0 | -9.125 | 0 |
| 2030 | 0 | 9.353 | 0 | 0 | 0 | -9.353 | 0 |
| 2031 | 10.371 | 9.587 | 3.523 | 0 | 0 | -2.739 | 0 |
| 2032 | 33.408 | 9.826 | 4.815 | 1.661 | 0 | 17.106 | 1.661 |
| 2033 | 37.356 | 10.072 | 4.935 | 3.942 | 0 | 18.407 | 3.942 |
| 2034 | 38.290 | 10.324 | 5.059 | 4.099 | 0 | 18.809 | 4.099 |
| 2035 | 39.247 | 147 | 5.185 | 4.805 | 384 | 28.727 | 5.189 |
| 2036 | 36.206 | 0 | 5.315 | 4.632 | 3.051 | 23.207 | 7.684 |
| 2037 | 33.400 | 0 | 5.448 | 4.382 | 5.893 | 17.678 | 10.274 |
| 2038 | 30.811 | 0 | 5.584 | 4.086 | 5.285 | 15.856 | 9.372 |
| 2039 | 28.423 | 0 | 5.723 | 3.768 | 4.733 | 14.199 | 8.501 |
| 2040 | 26.221 | 0 | 5.866 | 3.441 | 4.228 | 12.685 | 7.669 |
| 2041 | 24.189 | 0 | 6.013 | 3.116 | 5.120 | 9.940 | 8.236 |
| 2042 | 22.314 | 0 | 6.163 | 2.798 | 5.341 | 8.012 | 8.139 |
| 2043 | 20.585 | 0 | 6.317 | 2.492 | 4.710 | 7.065 | 7.202 |
| 2044 | 18.989 | 0 | 6.475 | 2.199 | 4.126 | 6.189 | 6.325 |
| 2045 | 17.518 | 0 | 6.637 | 1.921 | 3.584 | 5.376 | 5.505 |
| 2046 | 16.160 | 0 | 6.395 | 1.731 | 3.213 | 4.820 | 4.945 |
| 2047 | 14.908 | 0 | 6.162 | 1.556 | 2.876 | 4.314 | 4.432 |
| 2048 | 13.752 | 0 | 5.937 | 1.394 | 2.569 | 3.853 | 3.963 |
| 2049 | 12.686 | 0 | 5.720 | 1.245 | 2.289 | 3.433 | 3.534 |
| 2050 | 11.703 | 0 | 5.511 | 1.108 | 2.033 | 3.050 | 3.142 |
| 2051 | 10.796 | 0 | 5.310 | 983 | 1.801 | 2.702 | 2.784 |
| 2052 | 9.960 | 0 | 5.116 | 869 | 1.590 | 2.385 | 2.459 |
| 2053 | 9.188 | 0 | 4.930 | 764 | 1.398 | 2.096 | 2.162 |
| 2054 | 8.476 | 0 | 4.750 | 669 | 1.223 | 1.834 | 1.892 |
| 2055 | 7.819 | 0 | 4.576 | 583 | 1.064 | 1.596 | 1.647 |
| 2056 | 7.213 | 0 | 4.409 | 504 | 920 | 1.380 | 1.424 |
| 2057 | 6.654 | 0 | 4.248 | 432 | 789 | 1.184 | 1.222 |
| 2058 | 6.138 | 0 | 4.093 | 368 | 671 | 1.006 | 1.039 |
| 2059 | 5.662 | 0 | 3.944 | 309 | 564 | 846 | 873 |
| 2060 | 5.224 | 19.226 | 3.800 | 0 | 0 | -17.802 | 0 |
| | **563.665** | **90.974** | **157.960** | **59.857** | **69.454** | **185.420** | **129.311** |

*Tabell 5. Útrokning av skatti við uppskoti um vanligan kolvetnisskatt á 18%. Roknað verður við einum oljuprísi á 100 USD/fat. Her verður roknað við skattligum endurgjaldi fyri avtøkukostnað. Enn er ikki gjørt av, hvussu hesin spurningur eigur at verða handfarin.*

| Roknidømi við 100 USD/fat | Verandi skattaskipan | Uppskot |
|---|---|---|
| Intern renting av íløgu eftir skatt (hjá oljufelagi) | 27% | 28% |
| Skattur sum % av vinningi | 42% | 41% |
| Skattainntøkur | 134 mia. kr. | 129 mia. kr. |
| Nútíðarvirði av skattainntøkum (10%) | 32 mia. kr. | 29 mia. kr. |

*Tabell 6. Samandráttur av avleiðingum av uppskotinum. Roknidømi við oljuprísi á 100 USD/fat.*




*Mynd 11. Býti av inntøkum. Roknidømið við oljuprísi á 100 USD/fat vísir, at nærum helmingurin av inntøkunum fara til íløgu og rakstur, meðan vanligur og serligur kolvetnisskattur svara til tilsamans 24% av inntøkunum í verandi skipan og 23% av inntøkunum í uppskotinum. Tað svarar til ávikavist 42% og 41% av vinninginum eftir íløgu- og rakstrarkostnaðir.*

Umframt hesar beinleiðis skattainntøkur kunnu væntast aðrar óbeinleiðis inntøkur til landskassan. Íløgu- og rakstrarkostnaðir kunnu hugsast at vera partvís útførdir av føroyingum og føroyskum fyritøkum, sum harvið kunnu fara at rinda skatt í Føroyum.

## Gjøld

Lógaruppskotið ásetur eingi gjøld.

## Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Lógaruppskotið áleggur ongum likamligum ella løgfrøðiligum persóni skyldur.

**Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrinum ella kommunu.

**Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleika atgongd til privata ogn.

**Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Uppskotið tekur burtur føstu ásetingina av satsinum fyri vanligan kolvetnisskatt, sum í løtuni er óheftur av vanliga felagsskattinum. Hetta er sama áseting, sum upprunaliga var í løgtingslóg nr. 26 frá 21. apríl 1999 um at skatta inntøkur av kolvetnisvirksemi (kolvetnisskattalógini). Hendan áseting, at skattasatsurin skuldi vera tann sami sum fyri aðra vinnu, varð broytt við løgtingslóg nr. 26 frá 7. mars 2000.

Við hesum verður skotið upp at fara aftur til upprunaligu ásetingina, við tí úrsliti, at vanligur kolvetnisskattur verður álíknaður við 18% í staðin fyri við 27%.

**Til § 2**
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2026.

**Á Løgtingi, 16. februar 2025**

| | |
|---|---|
| Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur | Beinir Johannesen |
| Eyðdis Hartmann Niclasen | Bárður á Steig Nielsen |
| Steffan Klein Poulsen | Jenis av Rana |

**Fylgiskjal 1:** Framløga um uppskot til broyting í Oljuskattalóg